# Kári Nielsen hevur bitið seg fastan

**Tað er ikki pláss fyri Hans Fróða Hansen á landsliðnum, og hesaferð er eingin skálamaður úttikin**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Henrik Larsen hevur boðsent 18 spælarum til vinardystin, sum verður móti Malta mikudagin, 18. august.

Mest áhugavert er sjálvandi, at tveir teir størstu profilarnir í føroyskum fótbólti nú verða at síggja á liðnum. Teir eru Todi Jónsson, sum ikki hevur verið á liðnum seinastu meira enn trý árini, og Jón Rói Jacobsen, sum ikki hevur verið við seinasta lítla árið, tí hann hevur verið skaddur í knænum.

Todi boðaði fyrr í summar frá, at hann nú metti seg vera nóg væl fyri at taka eitt tørn afturat á landsliðnum, og Jón Rói Jacobsen sigur aðra staðni í blaðnum í dag, at hann gleðir seg til at spæla aftur á landsliðnum.

Sammett við vinardystinum móti Hollandi, er tað merkisvert, at HB-miðvallarin, Kári Nielsen, sum fyrstu ferð fekk boð ta ferðina, aftur hesa ferð er boðsendur. Harvið tykist hann hava bitið seg fastan í hópinum, meðan tað ikki er pláss fyri nøkrum skálamanni hesaferð. Jónhard Frederiksberg hevur annars verið sera væl upplagdur, meðan Pauli G. Hansen, sum eisini varð boðsendur til dystin móti Hollandi, hevur verið nógv skaðaplágaður síðani tá.

Av gomlu landsliðsspælarunum, um tað ber til at siga soleiðis um ungar fótbóltsspælarar, er Hans Fróði Hansen ikki boðsendur hesaferð.

Teir 18, sum hava fingið landsliðsboð, eru:


*Nú er Todi Jónsson aftur á føroyska fótbóltslandsliðnum. 18. august verður come-back á skránni, tá Malta vitjar á Svangaskarði*

Jens Martin Knudsen, NSÍ, Jákup Mikkelsen, KÍ, Óli Johannesen, TB, Pól Thorsteinsson, B36, Jón Rói Jacobsen, Frem, Johan Byrial Hansen, Horsens, Atli Danielsen, KÍ,. Súni Olsen, GÍ, Jákup á Borg, HB, Fróði Benjaminsen, Fram, Julian Johnsson, ÍF, Jann Ingi Petersen, Fremad Amager, Kári Nielsen, HB, Rógvi Jacobsen, HB, Hjalgrím Elttør, Fremad Amager, Andrew av Fløtum, Fremad Amager, John Petersen, B36, Todi Jónsson, FCK.

Dysturin móti Malta verður 18. august á Svangaskarði. Talan er sjálvsagt fyrst og fremst um fyrireiking til HM-undankappingardystirnar, sum verða á útivølli móti Sveis og á heimavølli móti Fraklandi 1. og 4. september. Men tað er einki at liggja omaná, at æran eisini stendur upp á spæl. Á FIFA-styrkislistanum er Malta seks pláss framman fyri Føroyar. 18. august skal finnast fram til, um hetta er, sum tað eigur at vera!



Kom og steðga vónloysinum

Vit kunnu øll ávirka teir myndugleikar, ið hava ábyrgdina av, at fólk verða fongslað av órøttum, pínd ella avrættað. Tú kanst gera tað við at fara inn á heimasíðuna hjá Amnesty International í Føroyum og tekna teg til at Skriva fyri lívi. Teknar tú teg til átakið, fært tú trý brøv um mánaðin, sum tú kanst senda teimum, ið hava ábyrgdina av, at mannarættindi verða brotin.

Tess fleiri, ið gera vart við órættvísi kring heimin, tess betur ber til at ávirka tey, ið hava ábyrgdina. Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo





# Vikuskifti

Nr. 148 • leygardagur • 7. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Jón Rói aftur á rættari kós

síða 2–3




*Mynd: Hardi Hansen*

# Tá eg verði stórur...

Hesir báðir fittu garparnir sita og njóta góða summarveðrið við sjóvarmálan á Gøtusandi.
Sum so mangir smádreingir undan teimum, líta teir langtandi út á hav, har pápi og abbar teirra eru, hvør umborð á sínum skipi

HAVIÐ OG VIT
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

"Tá eg verði stórur, tá verður tað gott, áh, hvat eg tá verði glaður! Á sjógvin eg sleppi dag og nátt, sum annar útróðrarmaður..." Við vælkenda sanginum um dreingin, sum gleðir seg at gerast vaksin, setti Jákup Hansen í sínari tíð orð á dreymarnar, sum hvør einasti smádrongur tá á døgum hevði - dreymin um at sleppa til skips.

Sjógvurin hevur altíð havt eina dragandi megi á menniskju og í Føroyum, her vit liva mitt í havinum, við sjógvi til allar síður, er sjógvurin lívið hjá flestu okkara.

Í øldir hava vit livað og ferðast á sjónum og lívæðr okkara - sjógvurin - kravdi so mangan tað kærasta, vit áttu.

Kring landið hava vit reist minnisvarðar yvir teir, sum fórust á sjónum - um okkara elskaðu menn, synir, brøður og pápar, sum fóru avstað at vinna breyð á borðið, men ongantíð komu aftur, tí deyðans náðileysa hond dró teir í havsins kalda dýpi.

Men yvir tær kvinnur, sum gjørdust einkjur ella tey, sum gjørdust faðirleys og barnleys - yvir tey er eingin minnisvarði reistur. Tey stríddust í tolni fyri at koma undan, og sorgina høvdu tey ikki stundir at geva seg til. So mong vóru tey, ið sótu eftir í ræðuligu sorgini og vistu sær eingi livandi ráð. Í einsemi runnu tárini, og mong neyðarrópini eru gjøgnum tíðirnar stigin upp til Guds um hjálp.

Men lívið er eisini gleði, ikki minst hjá sorgleysu børnunum. Tað er stuttligt, tá sólin skínur og mamma sigur, at nú fara vit á sandin at spæla. Jú, tá er gaman at vera til, og lívið er bara frálíkt. Tá spæla børnini á flógva og fína sandinum - tey byggja hús og borgir og laga langar garðar, sum Ismar Joensen so vakurt yrkir í einari av mongu perlunum, vit eiga í føroyskum skaldskapi.

Smádreingirnir eru troyttir eftir dagsins spæl, teir sita og hyggja út á hav og leingjast eftir babba, sum teir vita er har úti onkustaðni. Tey siga, at hann fiskar svartkjaft, og dreingirnir undrast og spyrja, hvussu tann fiskurin sær út. Hevur hann svartan kjaft, ella hví hevur hann eitt so løgið navn. Teir halda, at fiskurin við tí svarta kjaftinum má vera øgiliga stórur, tí teir hava hoyrt, at hann kostar nógvar, nógvar pengar. Men abbi hevur sagt teimum, at svartkjafturin er einki stórur, og teir skilja slett ikki, hvussu tað so ber til, at sildirnar ræðast hann so illa.

Nú er seint og tíð er at fara heim at balla seg í fjálgu songini, tí skjótt kemur Lummalykta-Óli at lýsa gjøgnum lyklarholið, fyri at vita, um øll børn eru løgst at sova. Og um eina lítla løtu sova hesir smáu. Í dreymi byggja teir slott og sigla á tjørnini við sluppum og línubátum, akkurát sum í sanginum hjá Alexandur Kristiansen, sum eisini er ein av teimum, sum við einfaldu barnarímum sínum megnar at seta tey vaksnu aftur í eydnusomu barnadagarnar.